# Stovna Manchester-felag í Føroyum

Í dag verður føroyskt felag fyri fjepparar hjá Manchester United ætlandi sett á stovn. Hetta hendir í Café Hattrick í Bowlinghøllini í Havn, har stovnandi aðalfundur skal haldast klokkan 17.30. Ein roynd er áður gjørd at stovna felag fyri fjepparar hjá Manchester United, men hóast nóg mikið av fjepparum eru, so fekk felagið ongan tíð tað skap, sum ætlandi skuldi verða. Í summar varð ein áhugabólkur settur at gera fyrireikandi arbeiðið til slíkt felag, og nú er hetta arbeiðið komið somikið langt, at stovnandi fundurin kann haldast.



# Trygvi skal hjálpa Brian

Trygvi Mortensen, sum í ár hevur hjálpt fyrrverandi landsliðsvenjaranum, verður nú hjálparvenjari hjá Brian Kerr. Tað framgongur av leikara- og leiðaralistanum, sum er sendir til Fraklands og Rumenia, har landsdystir verða spældir um stutta tíð. Trygvi Mortensen hevur í fleiri ár virkað sum venjari í Føroyum, men borgarliga starvið bar fyri nøkrum árum síðani við sær, at hann ikki ynskti at standa við høvuðsábyrgdini fyri nøkrum liði. Í ár hevur hann verið hjálparvenjari hjá Jógvani Martin Olsen og Víkingi, og nú hevur hann so játtað at tikið eitt tak á landsliðnum.

**Endastøðurnar**

| Nr. | 2005 Lið | Stig | 2006 Lið | Stig | 2007 Lið | Stig | 2008 *) Lið | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 54 | HB | 55 | NSÍ | 61 | EB/S | 55 |
| 2 | HB | 50 | EB/S | 54 | EB/S | 54 | HB | 49 |
| 9 | GÍ | 23 | B68 | 18 | AB | 17 | B71 | 23 |
| 10 | TB | 22 | ÍF | 16 | VB/S | 11 | Skála | 19 |

*) Í seinasta umfarinum vórðu dystirnir hjá EB/Streymi, HB og B71 dømdir at enda 0-0, tá veðurlíkindini gjørdu tað ógjørligt at spæla fótbólt.

**Talvan sýnir, hvussu nógv stig tey bæði ovastu og tey bæði niðastu liðini hava havt, síðani besta føroyska deildin í 2005 varð víðkað til at fevna um 27 umfør**

# KÍ hevur longu sett met

**Tá sagt verður, at niðurflytararnir í ár eru sterkari enn nakrantíð, stuðla hagtølini eisini undir útsøgnini. Ongan tíð áður hava niðurflytararnir havt so nógv stig, sum teir hava í ár**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tað ber sjálvandi ikki altíð eins væl til at sammeta hagtøl, men síðani kappingin í 2005 varð víðkað til at fevna um 27 umfør, hevur eingin niðurflytari havt somikið nógv stig, sum KÍ hevur tað hesaferð.

KÍ hevur 24 stig undan seinasta umfarinum, og tað er eitt meira, enn GÍ og B71 høvdu eftir kappingarnar í ávíkavist 2005 og 2008. Í 2005 slapp GÍ tó undan niðurflytingini, tá bert eitt lið flutti beinleiðis niður. Og tað hoyrir eisini við til tí støðuna, at var tað ikki fyri eitt mál hjá Hanusi Jacobsen í yvirtíðini á Skála á seinasta leikdegi, fór GÍ niður við einum máli meira í minus enn TB. Og í fjør varð seinasti dysturin hjá B71 dømdur at enda 0-0, so hypotetiskt kundu sandoyingar tá eins væl havt 22 ella 25 stig.

## 55 røkka til gullið

Vinnur HB dystin í Sørvági í morgin, so røkka teir 55 stigum, og júst hetta talið tykist vera tað magiska talið, um gullið skal vinnast. Undantakið er NSÍ, sum í 2007 vann 61 stig, men silvurvinnarnir høvdu tá 54, sum jú er eitt minni enn 55.

Merkisvert er tó eisini, at silvurið í ár tykist fara hampuliga bíligt. Eins og hjá EB/Streymi í fjør, so er HB sloppið sera bíliga, tá fáu hálv- og heilkiksararnir hava verið, tí kappingarneytarnir eru á sama hátt snávaðir hvørjaferð.

Alt hetta eru tó bara tøl. Fyri HB telur tað einamest, at teir standa ovastir leygardagin – líkamikið, hvussu tað spælir av í hinum uppgerðunum kring landið.

# vodafone deildin

| | Lið | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 26 | 15 | 7 | 4 | 56 | 35 | 21 | 52 |
| 2 | EB/S | 26 | 14 | 5 | 7 | 54 | 34 | 20 | 47 |
| 3 | Víkingur | 26 | 13 | 5 | 8 | 50 | 36 | 14 | 44 |
| 4 | B68 | 26 | 12 | 6 | 8 | 47 | 40 | 7 | 42 |
| 5 | NSÍ | 26 | 12 | 5 | 9 | 53 | 45 | 8 | 41 |
| 6 | AB | 26 | 9 | 7 | 10 | 29 | 34 | -5 | 34 |
| 7 | ÍF | 26 | 8 | 6 | 12 | 44 | 45 | -1 | 30 |
| 8 | B36 | 26 | 7 | 6 | 13 | 36 | 52 | -16 | 27 |
| 9 | KÍ | 26 | 6 | 6 | 14 | 30 | 55 | -25 | 24 |
| 10 | 07 Vestur | 26 | 4 | 7 | 15 | 37 | 60 | -23 | 19 |

**Formbarometrið**

| | Lið | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 6 | 4 | 1 | 1 | 15 | 9 | 6 | 13 |
| 2 | Víkingur | 6 | 3 | 1 | 2 | 13 | 9 | 4 | 10 |
| 3 | B68 | 6 | 3 | 0 | 3 | 9 | 9 | 0 | 9 |
| 4 | HB | 6 | 2 | 2 | 2 | 8 | 8 | 0 | 8 |
| 5 | AB | 6 | 2 | 2 | 2 | 9 | 11 | -2 | 8 |
| 6 | ÍF | 6 | 2 | 1 | 3 | 16 | 14 | 2 | 7 |
| 7 | 07 Vestur | 6 | 2 | 1 | 3 | 9 | 11 | -2 | 7 |
| 8 | NSÍ | 6 | 2 | 1 | 3 | 9 | 12 | -3 | 7 |
| 9 | KÍ | 6 | 2 | 1 | 3 | 6 | 14 | -8 | 7 |
| 10 | B36 | 6 | 2 | 0 | 4 | 11 | 15 | -4 | 6 |

**1. deild**

| | Lið | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 26 | 15 | 6 | 5 | 64 | 40 | 24 | 51 |
| 2 | B71 | 26 | 14 | 7 | 5 | 57 | 35 | 22 | 49 |
| 3 | HB | 26 | 13 | 6 | 7 | 55 | 36 | 19 | 45 |
| 4 | TB | 26 | 13 | 5 | 8 | 53 | 44 | 9 | 44 |
| 5 | B68 | 26 | 10 | 6 | 10 | 64 | 54 | 10 | 36 |
| 6 | Víkingur | 26 | 8 | 10 | 8 | 43 | 38 | 5 | 34 |
| 7 | NSÍ | 26 | 9 | 6 | 11 | 44 | 51 | -7 | 33 |
| 8 | Skála | 26 | 9 | 5 | 12 | 38 | 38 | 0 | 32 |
| 9 | FC Hoyvík | 26 | 10 | 1 | 15 | 32 | 53 | -21 | 31 |
| 10 | MB | 26 | 2 | 2 | 22 | 27 | 88 | -61 | 8 |

**1. deild kvinnur**

| | Lið | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 16 | 2 | 1 | 94 | 7 | 87 | 50 |
| 2 | AB | 19 | 14 | 3 | 2 | 50 | 11 | 39 | 45 |
| 3 | Víkingur | 19 | 10 | 4 | 5 | 38 | 23 | 15 | 34 |
| 4 | Skála | 19 | 7 | 1 | 11 | 24 | 46 | -22 | 22 |
| 5 | EB/Streymur | 19 | 2 | 2 | 15 | 9 | 67 | -58 | 8 |
| 6 | B68/NSÍ | 19 | 1 | 2 | 16 | 8 | 69 | -61 | 5 |

**Sunset-kappingin**

| | Lið | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 1 | 1 | 0 | 0 | 33 | 19 | 14 | 2 |
| 2 | Tjaldur | 1 | 1 | 0 | 0 | 32 | 25 | 7 | 2 |
| 3 | Neistin | 1 | 1 | 0 | 0 | 25 | 21 | 4 | 2 |
| 4 | VB | 1 | 0 | 0 | 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 5 | StÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |
| 6 | VÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 19 | 33 | -14 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | Lið | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 32 | 25 | 7 | 2 |
| 2 | VÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 29 | 23 | 6 | 2 |
| 3 | Neistin | 1 | 1 | 0 | 0 | 27 | 26 | 1 | 2 |
| 4 | H71 | 1 | 0 | 0 | 1 | 26 | 27 | -1 | 0 |
| 5 | KÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 23 | 29 | -6 | 0 |
| 6 | Kyndil | 1 | 0 | 0 | 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |

# Dystir um vikuskiftið

## Fótbóltur

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 03.10 | B36-B68 | Lars Muller |
| 03.10 | AB-Víkingur | Rúni Gaardbo |
| 03.10 | ÍF-NSÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 03.10 | KÍ-EB/S | Dagfinn Olsen |
| 03.10 | 07 Vestur-HB | Petur Reinert |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 03.10 | TB-B68 | Bent T. Linklett |
| 03.10 | Víkingur-HB | Alex Troleis |
| 03.10 | B71-NSÍ | Bárður Mortensen |
| 03.10 | Skála-VB/S | Birgir Sondum |
| 03.10 | MB-FC Hoyvík | Eiler Rasmussen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 03.10 | KÍ-Skála | Elsa Andreasen |
| 03.10 | AB-B68/NSÍ | Búi F. Clementsen |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 04.10 | 14.30 | Neistin-Stjørnan |
| 04.10 | 14.30 | VÍF-Tjaldur |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 04.10 | 16.00 | Neistin-VÍF |
| 04.10 | 16.00 | StÍF-H71 |
| 04.10 | 16.00 | VÍF-Kyndil |